gult cyan magenta svart



## Hósdagur 5. apríl

### SVF

18.30 Pinkupól 5
18.35 Jumanji 10
19.00 Trý ynski
19.10 Basalt (e)
20.00 Dagur og Vika við Grannum Okkara
20.50 Ferðaliðið - donsk dramarøð
21.50 Seinasti steðgur áðrenn mánan - donsk dokumentar
22.20 Krimitímin: Dalziel og Pascoe - ensk røð
23.10 Søgur av einari politistøð - seinasta sending
0.10 Liðugt

### Eurosport

07:30 Curling
09:30 Golf
10:30 Car Racing
11:00 Super Racing Weekend(Tm)
11:30 Motorcycling
12:00 Darts
13:00 Darts
14:00 Curling
16:45 News
17:00 Trial
18:00 Xtreme Sports
18:30 Ice Speedway
19:30 Curling
21:00 Boxing
22:00 News
22:15 Football
23:15 Curling
00:15 News
00:30 Close

### BBC Prime

00.00 Tlz Promised Land
01.00 Tlz White Heat
02.00 What Have The '70s Ever Done For Us?
02.10 Background Brief - First Came Dolly
02.30 A Formidable Foe
03.00 The Next Big Thing: The Reality Of Risk
03.30 The Ageing Files
04.00 Tlz French Fix
04.30 Tlz Watch: Art Start
04.50 Tlz Troubleshooter
05.30 Tlz The Ozmo English Show
06.00 Toucan Tecs
06.10 Playdays
06.30 Insides Out
07.00 The Really Wild Show
07.30 Ready Steady Cook
08.15 Style Challenge
08.40 Change That (Set 01)
09.05 Going For A Song
09.30 Vets To The Rescue
10.00 Antiques Roadshow
10.30 Tlz Meet The Ancestors
11.20 Country Tracks
11.50 Ready Steady Cook
12.35 Style Challenge
13.00 Doctors
13.30 Eastenders
14.00 Change That (Set 01)
14.25 Going For A Song
15.00 Toucan Tecs
15.10 Playdays
15.30 Insides Out
16.00 The Really Wild Show
16.30 Totp Eurochart
17.00 Changing Rooms
17.30 Doctors
18.00 Eastenders
18.30 Animal Hospital
19.00 Dinnerladies
19.30 Blackadder Goes Forth
20.00 Casualty
21.00 Absolutely Fabulous
21.30 Totp Eurochart
22.00 Maternity
22.50 Maternity
23.40 Doctor Who: Snakedance

### BBC World

00:00 BBC News
00:30 HARDtalk (r)
01:00 BBC News
01:30 Holiday (r)
02:00 BBC News
02:30 Reporters (r)
03:00 BBC News
03:30 Asia Today (r)
03:45 World Business Report (r)
04:00 BBC News
04:30 HARDtalk (r)
05:00 BBC News
05:30 Top Gear (r)
06:00 BBC News
06:30 Reporters (r)
07:00 BBC News
07:30 HARDtalk
08:00 BBC News
08:30 Talking Movies (r)
09:00 BBC News
09:30 Team Polar 2000 (r)
10:00 BBC News
10:30 HARDtalk (r)
11:00 BBC News
11:30 Holiday (r)
12:00 BBC News
12:30 Team Polar 2000 (r)
13:00 BBC News
13:30 HARDtalk (r)
14:00 BBC News
14:15 World Business Report
14:30 Top Gear (r)
15:00 BBC News
15:30 Team Polar 2000 (r)
16:00 BBC News
16:30 Asia Today
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Click Online
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Panorama
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

### 3 Viasat

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:05 TV-shop
08:30 Garfield og venner
08:55 Sunset Beach
09:45 Træneren
10:15 Horton-sagaen (933) (G)
11:05 Horton-sagaen
11:55 Melrose Place - classic
12:50 Vild med dig
13:20 Panter-tanter
13:50 Xena - amazonekrigeren
14:45 Baywatch
15:40 Min kære familie
16:05 Ricki Lake
17:05 Før Skjulte Spor
17:10 Dagens Nyheder på TV3
17:30 Baren (63) (G)
18:00 Alle tiders barnepige
18:30 Baren
19:00 GRISK - når det gælder
20:00 Skjulte Spor
21:00 TV Razzia
21:30 Heksene fra Warren Manor
22:25 Baren (64) (G)
22:55 Dagens Nyheder på TV3
23:05 Vore værste år
23:35 Simpsons
00:05 Ellen
00:35 Kojak
01:35 I lyst og nød
02:00 Drøm videre
02:30 Ellen (101) (G)
02:55 Ricki Lake (G)
03:55 Godnat

### Útvarp Føroya

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlesturin - Andras Danielsen á Stondum lesur
7.15 Barnaløtan - Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri
7.30 Tíðindi
7.35 Morguntónleikur
8.00 Tíðindi
8.03 Morgunrásin
9.00 Tíðindi
9.03 Morgunrásin
9.50 Morgunlesturin - Andras Danielsen á Stondum lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fyrrapartsløg - Øssur Egholm stílar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Ferðin til Zambora (e) - Hans Tórgarð lesur 4. part av framhaldssøgu eftir Annfinn í Skála.
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Heimurin í dag (e) - Óluva Zachariasen leggur til rættis
13.30 Tónleikur
14.00 Fimmarin (e) - Sigmar Bláberg leggur til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Frívaktin - Sending við tónleiki og práti um sjómanslív. Elis Poulsen skipar fyri
16.00 Tíðindi
16.03 Ársins Songrødd í Havn - Ginna Midjord stílar fyri
17.00 Tíðindini
17.05 Í Víngarðinum
18.05 Barnaløtan (e) - Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Tilvera - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Harmonikutónar - Flóvin Jacobsen skipar fyri
20.30 Á sanganna veingjum - Gunnvør Poulsen stílar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Ginna Midjord skipar fyri
22.00 Rák - Anita Ottosen stílar fyri
23.00 Tíðindi

# Seinasti steðgur áðrenn mánan

*– Donsk dokumentarsending*

**SVF Hóskvøldið kl. 21.50**

Vit fylgja teim fyrstu danskarunum, sum hava staðið á skíðum frá strondini í Antarktis til Suðurpólin. Í 56 samdøgur stríddu Gregers og Kristian seg teir tann 1200 kilometra langa teinin gjøgnum tað, sum ævintýrarar hava kallað »Seinasti steðgur áðrenn mánan«. Hetta gjørdist ein strævin og kaldur túrur – og ein túrur, har vinarlagi teirra millum eisini skuldi standa sína roynd.

# Skjulte spor

*– Donsk dramarøð 13. partur*



**3 Hóskvøldið kl. 20.00**

*»Kærleikans fongsul«*
Deildin hevur tað ikki gott, eftir at Jonas er farin, og serliga Henriette hevur tað torført. Men allir persónligir trupulleikar mugu víkja, tá ein kendur rocktónleikari verður myrdur undir løgnum umstøðum.

Tveir bardagasinnaðir bandar gera klárt til bardaga, og hóttanin um eitt nýtt rockarakríggj førir løgregluna niður í ein heim, sum er merktur av sex, harðskapi svørtum peningi. Her er einki trygt. Og meðan rockararnir brynja seg til bardaga, vísa stripparnir Ina og Jeanet seg at vera lykilin til nakað, sum kanska er annað og meira enn ein vanlig bandauppgerð

# Grisk



*Thomas Mygind letur 2 milliónir til vinnaran.*

Hvussu nógvar møguleikar ert tú tilreiðar at taka fyri at gerast tvífaldur millióningur? Fert tú bjóða liðfeløgum tínum av? Fert tú halda leiðina fram uppeftir pengatrappuni og vága at missa alt í jagstranini fyri at blíva ríkari enn í tínum villasta hugaheimi. Hvussu langt torir tú at fara?

**3 Hóskvøldið kl. 19.00**

### Rás 2 FM 102 FM 107

10.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
11.00 Birgir Beinleiðis - Birgir Sondum við gesti
12.00 Tíðindi & Lýsingar
13.00 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur
14.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarunum
15.00 Tíðindi og lýsingar
15.15 Ynskiløtan (framhald)
16.00 Laila Beinleiðis - Country, Laila Jacobsen leggur til rættis
17.00 Norðlýsið! - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis.
18.00 Tíðindi og lýsingar
18.15 Lættur tónleikur
19.00 Orð á leiðini EVR-sending - »Jesus: hvør er hann?« - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og lýsingar
21.15 Orðið (e) - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri - Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo

### Lindin

13.00 Byrjan – Dagsskrá
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin, vertur er M.C. Restorff (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikur
17.00 Ungdómssendingin Get Ready v/ Rigmor og Rebekku
18.00 Dagsins Orð
18.05 The Finishing Touch - Ensk sending við tónleiki og práti. Vertur er Alex O'Campo
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.05 "The Finishing Touch« heldur fram
20.00 »Við Honum út á Golgata« Upplestur úr bókini hjá Fredrik Wisløff úr Jesusar líðingarsøgu.
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Møti kunngeðir fyri komandi vikuskifti.
21.00 Bønarlinjan við gesti - Bønarevnu kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379 - Vertur: Jenis av Rana
Vit gevast uml. middnátt


# ítróttur

Nr. 63 • fríggjadagur • 30. mars 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


# Keddur og fegin

*Landsliðsvenjarin var sjálvsagt fegin um avrikið, sum menninir høvdu sýnt á vøllinum, men hann harmaðist tapið*



**Hóast eitt tepurt tap altíð smakkar illa, so kundi Allan Simonsen ikki vera annað enn fegin um avrikið, sum hansara menn høvdu sýnt í Moskva**

LANDSDYSTUR
*Álvur Haraldsen/Jákup Mørk - Moskva*

Hóast Allan Simonsen var fegin um góða avrikið í Russlandi, kundi gleðin um hetta ikki káva yvir vónbrotið um, at tað ikki hevði gingist føroyska liðnum eitt lítið vet betri.

Eftir dystin fingu vit orð á hann, vit spurdu sjálvandi fyrst, hvussu hann var nøgdur við avrikið hjá leikarunum, og her hevði venjarin so bara rós at bera teimum.

– Eg haldi sjálvur, at vit spæla ein góðan dyst. Allir leikararnir halda tær avtalur, sum vit framman undan høvdu gjørt, og hóast vit ikki skapa so nógv, so var tað heldur ikki tað, sum vit ætlaðu.

– Eisini var talan um ein keðiligan vøll, og kuldi og annað gjørdu sítt til, at tað langt ífrá var optimalt hjá okkum at spæla landsdyst nú.

Hóast hann sostatt tóktist nøgdur, so kundi venjarin tó ikki lata vera við at iðra seg um tapið.

– Nei, tað er greitt, at tá man er somikið nær við, so er tað sera keðiligt at tapa. Hevur tú tapt við trimum ella fýra málum, so er allar helst ikki so nógv at gera. Støaðn er ein onnur, tá tu hevur tapt 1-0. Tá hevur tú verið so nær, sum til ber, skapt nakrar møguleikar og so vórðu vit eisini snýttir fyri brotsspark, so sjálvandi er tað keðiligt.

### Vil hava tveir frammi

Tað kom kanska óvart á mong, at Allan aftur valdi at spæla við tveimum áleyparum, og at hann á hendan hátt gav rúmd fyri Christian Høgna Jacobsen. Spurdur, um hetta hongur saman við teimum royndum, sum hann gjørdi sær í Sveis fyri hálvum ári síðani, svarar hann, at tað var tað ikki.

– Sjálvandi spæla tær royndirnar inn, men eg vil altíð royna at spæla við tveimum áleyparum. Eg haldi fyrst og fremst, at hetta er meira mennandi fyri leikararnar. Tað var eisini nakað, sum eg setti mær fyri, tá eg gjørdist landsliðsvenjari, og tað er bert í einstøkum dystum, at vit ikki hava tveir frammi, og tá hava tað ofta verið serstakar orsøkir, sum hava gjørt seg galdandi.

– Eg haldi nú, at vit hava funnið ein reyðan tráð, har vit hava sligið fast, at vit altíð spæla við tveimum áleyparum. Eisini um mótstøðuliðið er Russland ella ein onnur sterk fótbóltslið.

### Stóðu royndina

Eftir teir báðar dystirnar á hesi ferðini ber illa til at siga annað, enn at framtíðin hjá landsliðnum sær sera ljós út. Allir teir ungu leikararnir, sum hava roynt seg á ferðini hava staðið royndina við góðum úrslitið. Allan er ikki ósamdur í hesum, men vísur samstundis á, at hetta er nakað, sum hevur verið leingi ávegis.

– Vit hava jú havt teir í myndini leingi, og teir eru eisini spakuliga slopnir at royna seg. Vit mugu barasta ikki tveita teir beint fyri leyvurnar, tí tá verða teir etnir sum rátt kjøt.

– Hinvegin er tað hugaligt at staðfesta, at teir veruliga eru vaksnir við uppgávuni, sigur Allan Simonsen at enda.

# Veiðumaðurin

**Russiska bjørnin kundi ikki á nakran hátt kenna seg trygga, tá teir mikukvøldið skuldu dystast við millum annað Kurt Mørkøre. Hóast mótstøðan var sterk, fór hann alt fyri eitt á bjarnaveiðu, og hóast hann onga rakti, so mundi ferðin tó vera á eini leið**

*Álvur Haraldsen/Jákup Mørk - Moskva*

Verður hugsað um kropsliga partin av spælinum, so er lítið at ivast í, at Kurt Mørkøre í nógvum var tann, sum lyfti tyngstu byrðuna fyri føroyska liðið. Nærdystirnir vóru nógvir í tali, og Kurt helt eisini eftir dystin, at talan var um nakrar væl vaksnar harrar, sum hann hevði dystast ímóti.

– Tað er einki at ivast í, at teir vóru sterkir – øgiliga sterkir, sigur hann.

– Eg vil tó ikki siga, at tað var nakað, sum nervaði meg. Vit spæla eisini móti stórum og sterkum monnum í Noregi, men eg má so viðganga, at hesir eisini dugdu nakað betri at spæla fótbólt.

### Ikki útlúgvaður

Tað kundi kanska verið líkt til, at tað var fysiska møðin, sum viðførdi, at Allan Simonsen miðskeiðis í seinna hálvleiki valdi at skifta Kurt út. Nærdystirnir høvdu helst kostað sítt, men kortini helt Kurt ikki, at møði var orsøkin.

– Nei, eg hevði væl klára at spælt í allar 90 minuttirnar. At eg varð tikin út, komst av teirri orsøk, at Allan vildi hava eitt betri tak á miðvøllinum, og tí varð Sámal settur inn fyri meg. Tað er sjálvandi skuffandi í teirri løtu, at tú verður tikin av vøllinum, men hetta er altíð burturi eftir tveimum minuttum ella so.

– Er tað betri fyri liðið, at ein útskifting verður gjørd, so er tað sjálvandi í lagi, sigur Kurt Mørkøre at enda.



*Hjálpir tað liðnum, at eg verðið skiftur út, so er tað sjálvandi í lagi*